# Eftirlønarreglugerð
# fyri
# Eftirlønargrunn Føroya Arbeiðarafelags

**(FA-eftirlønargrunnurin)**

## § 1

## Endamál

**Stk. 1.** Endamálið við reglugerðini er at fyriskipa nærri reglur fyri rættindum og skyldum hjá limum grunsins.

## § 2

## Limir

**Stk. 1.** Sum limir í eftirlønargrunninum gerast:

a. Lønmóttakarar, sum hava rætt og skyldu til limaskap sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og ávikavist Føroya Arbeiðsgevarafelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafeløgini.

b. Aðrir lønmóttakarar, hvørs vegna eftirlønargjøld skulu gjaldast grunninum eftir ásetingum í sáttmálum ella avtalum, sum hava líknandi ásetingar sum frammanfyri nevndu sáttmálar. Upptøka av nýggjum limabólkum skal ikki umsitingarliga ella fíggjarliga tyngja upprunaliga limaskaran.

**Stk. 2.** Undantøk frá frammanfyri nevndu ásetingum kunnu gerast fyri ávísar bólkar eftir almennum treytum, sum ikki geva høvi til spekulatión móti eftirlønargrunninum. Slíkar treytir verða gjørdar av nevnd grunsins.

**Stk. 3.** Limaskapurin verður varðveittur við eftirlønaraldur, við hvílandi limaskapi, við gjalding fyri egna rokning.

**Stk. 4.** Limirnir í grunninum hefta ikki persónliga fyri skyldum grunsins.

## § 3

## Flyting til og frá øðrum eftirlønarskipanum

**Stk. 1.** Virðið av einari eftirlønarskipan frá undanfarnum starvi, kann flytast til hækking av tí sum limurin eigur innistandandi.

**Stk. 2.** Við flytan til annað starv við skyldu til limaskap í einari eftirlønarskipan, kann tað sum limurin eigur inni standandi flytast til nýggju eftirlønarskipanina eftir tí av nevndini góðkendu flytingaravtalu við nýggja eftirlønargrunnin.

§ 4

**Útgjald áðrenn eftirlønaraldur, í samband við varandi flyting**

**Stk. 1.** Um galdandi lóggáva, tvs eftirlønarlógin ella rentutryggingarlógin, loyvir hesum, kann:

- limur við fremmandum ríkisborgararætti eins og danskarar og grønlendingar, sum flyta úr Føroyum fáa eftirlønaruppsparing sína útgoldna. Limur,sum eina ferð hevur fingið eftirlønina útgoldna og kemur aftur til Føroyar at arbeiða, kann tó ikki fáa eftirlønina útgoldna fyrr enn 10 ár aftaná at limurin er fluttur av landinum aftur.

- føroyingar, sum er limir í grunninum, í 8 ár hevur búð uttanlands, fáa eftirlønaruppsparing sína útgoldna.

§ 5

**Eftirlønargjald**

**Stk. 1.** Eftirlønargjøldini hjá limunum eru sáttmálaásett. Eftirlønarinngjøldini verða rindaði á persónliga eftirlønarkonto hjá hvørjum einstøkum limi. Av hvørjari persónligari eftirlønarkonto verður í mesta lagi 5 % sett av til limakonti.

Innistandandi á limakonti verður roknað við í basiskapital grunsins, men er annars javnsett við uppsparingina á eftirlønarkonti, bæði viðvíkjandi viðgerð av vinningi og tapi og í sambandi við útgjald av eftirløn til limir grunsins.

**Stk. 2.** Eyka eftirlønargjald kann avtalast við arbeiðsgevaran.

**Stk. 3.** Samlaða eftirlønargjaldið verður inngoldið av arbeiðsgevaranum samsvarandi sáttmálunum.

**Stk. 4.** Um inngjaldingin av eftirlønargjøldum sambært sáttmálanum heldur uppat, so hevur limurin rætt at halda áfram við inngjaldingini fyri egna rokning. Hetta val skal gerast í seinasta lagi 3 mánaðir aftan á, at inngjaldingarnar sambært sáttmálanum eru steðgaðar.

Nevnd grunsins ásetir nærri treytir fyri inngjalding fyri egna rokning og støddina av slíkum inngjøldum.

§ 6

**Veitingar úr grunninum**

**Stk. 1.** Eftirlønargrunnurin veitir:

- Elliseftirløn sambært grein 7

- Um limur doyr áðrenn eftirlønaraldur ella áðrenn øll lutaeftirlønin er goldin, so verður eftirlønin útgoldin til hjúnafelagin/sambúgvan ella lívsarvingunum, sum ásett í grein 8.

Sum sambúgvi sambært hesari reglugerð er at skilja, at limurin og sambúgvin hava sama bústað og skulu hava, ella hava havt barn saman ella at limurin og sambúgvin hava livað saman sum hjún á felags bústaði 2 ár áðrenn andlátið.

Um ein limur doyr eftir at vera komin til eftirlønaraldur, men áðrenn gingin eru 10 ár, kemur hjúnafelagin/sambúgvin í hansara stað og síðani lívsarvingarnir við 100 % av eftirlønarupphæddini í restini av 10- ára tíðarskeiðinum frá tí degi limurin byrjaði at fáa eftirløn.

Um limurin hvørki hevur hjúnafelaga/sambúgva ella lívsarvingar, so verður onki útgoldið.

## § 7

## Elliseftirløn

**Stk. 1.** Upprunaliga skipanin við skatting við útgjaldi:

Aldurseftirlønarútgjalding kann, byrja frá tí, at limurin er 60 ár, treytað av at limurin er farin úr starvi, um ikki galdandi lóggáva ásetir aðrar treytir.

Útgjald av eftirløn skal í seinasta lagi byrja tá limurin fyllir 70 ár.

**Stk. 2.** Eftirløn sambært eftirlønarlógini frá 2013:

Aldurseftirlønarútgjalding fer fram sambært galdandi lóggávu.

**Stk. 3.** Støddin av eftirlønargjøldunum verður ásett við støði í innistandandi hjá liminum, tá viðkomandi byrjar at fáa elliseftirløn, við støði í útrokningargrundarlagnum í §10.

**Stk. 4.** Talan er um eina lívrentuskipan og skipan við lutaeftirløn. Um talan er um smærri upphæddir, so kann útgjaldingin fara fram í einum, um galdandi lóggáva loyvir tí.

Við støði í verandi lóggávu er skipanin frá 1. desember 2014 hendan:

Upprunaliga skipanin við skatting við útgjaldi:

- Øll uppsparing upp til kr. 50.000,00 verður útgoldið í einum

- Uppsparing yvir kr. 50.000,00 verður øll útgoldin sum ein lívstreytað veiting. Um veitingin er í mesta lagi kr. 4.000,00 um mánaðin, verður roknað út eitt útgjaldstíðarskeið, sum svarar til kr. 4.000,00 um mánaðin. Um limurin doyr innan fyri tey fyrstu 10 árini verður restupphæddin til 10 ára tíðarskeiðið er runnið útgoldin hjúnafelaga/sambúgva ella um eingin hjúnafelagi/sambúgvi er, so lívsarvingunum. Í tann mun lóggávan loyvir hesum, so verður upphæddin umroknað til eingangsgjald, sum verður útgoldið í einum.

- Um limurin doyr áðrenn eftirlønaraldur, so verður eftirlønin útgoldin hjúnafelaga/sambúgva ella, um eingin hjúnafelagi ella sambúgvi er, so lívsarvingunum

Eftirløn sambært eftirlønarlógini frá 2013:

- Uppsparing upp til kr. 60.000,00 verður útgoldin í einum
- Uppsparing størri enn kr. 60.000,00 og undir kr. 400.000,00 verður útgoldin við kr. 60.000,00 sum eingangsgjald og restin verður goldið við kr. 2.500,00 um mánaðin
- Uppsparing kr. 400.000,00 og meira verður útgoldin við 15 % sum eingangsgjald og rest sum lívrenta
- Um limurin doyr innan fyri tey fyrstu 10 árini verður restupphæddin til 10 ára tíðarskeiðið er runnið útgoldin hjúnafelaga/sambúgva ella um eingin hjúnafelagi/sambúgvi er, so lívsarvingunum. Í tann mun lóggávan loyvir hesum, so verður upphæddin umroknað til eingangsjald, sum verður útgoldið í einum.
- Um limurin doyr áðrenn eftirlønaraldur, so verður eftirlønin útgoldin hjúnafelaga/sambúgva ella um eingin hjúnafelagi ella sambúgvi er, so lívsarvingunum

Upphæddirnar omanfyri verða javnaðar sambært teimum javningum, sum framdar verða eftir grein 15 í eftirlønarlógini.

**Stk. 5.** Elliseftirlønin verður útgoldin mánaðarliga forút tann 1. í mánaðinum, seinastu ferð fyri tann mánaðin tá limurin doyr um talan ikki er um uppathaldandi veiting.

## § 8

## Persónligi rætturin til eftirlønina.

**Stk. 1.** Limir grunsins kunnu ikki ráða yvir rættinum til eftirlønarskipanina við avhending, veðseting ella á annan hátt. Ræ.tturin kann heldur ikki vera fyri rættarsókn av nøkrum slag frá kravánarum. Hetta er galdandi bæði fyri pening á limakonti og pening á eftirlønarkonti.

## § 9

## Skattareglur

**Stk.1.** Allar inn- og útgjaldingar av eftirløn sambært hesari reglugerð verða álagdar teimum til eina og hvørja tíð galdandi gjalds- og skattareglum.

## § 10

## Útrokningarstøði

**Stk. 1.** Útrokningarstøðið, sum ásett verður av tryggingarserkøna (aktuari) grunsins í samráð við nevndini, verður fráboðað Tryggingareftirlitinum.

**stk. 2.** Útrokningarstøðið er tað sama fyri kvinnur og menn.

**Stk. 3.** Allir limir fáa lut í avlopinum eftir tí til Tryggingareftirlitið fráboðaðu tøkniliga grundarlagnum.

## § 11

## Fyrning

**Stk.1.** Er ikki roynt at taka út eftirløn í seinasta lagi 5 ár eftir at eftirlønin er gjaldtøk so er kravið fyrnt og eftirlønarupphæddin fellur til tiltaksgrunnin grunsins.

## § 12

## Gildiskoma

**Stk. 1.** Hendan reglugerð er viðtikin á nevndarfundi tann 16.01.2003

Eftirlønarreglugerðin er galdandi frá 1. januar 2003.

Broytt á nevndarfundi tann 19.02.2004
Broytt á nevndarfundi tann 29.04.2005
Broytt á nevndarfundi tann 02.02.2006
Broytt á nevndarfundi tann 14.11.2007
Broytt á nevndarfundi tann 08.12.2008
Broytt á nevndarfundi tann 12.11.2009
Broytt á aðalfundi tann 16.03.2013
Broytt á nevndarfundi tann 27.11.2013
Broytt á nevndarfundi tann 07.03.2014
Broytt á nevndarfundi tann 13.02.2015
Broytt á nevndarfundi tann 26.08.2016
Broytt á nevndarfundi tann 01.12.2017
Broytt á nevndarfundi tann 30.01.2018

Nevndin

Georg F. Hansen
Formaður

Páll Nielsen
næstformaður

Sunrid Vang

Jan Otto S. Holm

Hans Jacob Joensen